# Eldrasambýlið á Heygnum vígt



*Jóannis Dalsgarð, stjóri á Húsalánsgrunninum, Olivur Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*



*Norðoya tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, Vilhelm Johannesen og Jógvan Gerðalíð nutu tað góða veðrið á altanini*



*Tilsamans nærum 1.000 fólk vitjaðu sambýlið á Heygnum sunnudagin, tá tað varð vígt*

**Tilsamans 1.000 fólk vitjaðu spildurnýggja eldrasambýlið undir Kráarbrekku sunnudagin, tá Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur vígdi tað Har vóru røður, kór- og felagssangir, navnið varð avdúkað og pinnamatur við te og kaffi og sodavatn**

VÍGSLA

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Allir trupulleikar við nýggja sambýlinum lótu til at vera lagdir afturum, tá ein sonn hatíðarløta varð hildin í sambýlinum í sambandi við, at tað bleiv vígt sunnudagin. Nógv varð gjørt burtur úr degnum nú eldrasambýlið endiliga bleiv vígt. Tey fyrstu búfólkini kunnu væntandi flyta inn í dag, týsdagin.

Tað vóru avbera nógv fólk, sum høvdu nýtt høvi til at fara til vígsluna. Tilsamans 1.000 fólk vitjaðu henda dagin, verður sagt. Veðrið var av tí allarfagrasta, tað besta ein kann vænta sær ein várdag. Grækarismessuhald var í býnum eisini, so tá tað var liðugt løgdu tey flestu leiðina norður á Kjalarvegin til sambýlið undir Heygnum.

17 sangarar sungu nakrar sangir, og tað ljóðaði sum altíð frálíka gott. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri og formaður fyri nevndini í sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku, beyð vælkomin og helt eina røðu har hann millum annað kom inn á, hvussu týdningarmikið tað var, at Jóhannes á Heygnum, sum í sínari tíð var so mikið framsíggin, at hann lat sína trøð til kommununa til eldraíbúðir. Steinbjørn fegnaðist sjálvandi um, at sambýlið nú fer at lata upp, og hann ynskti bæði bú- og starvsfólkunum góða byr framyvir. Tá Steinbjørn endaði sína røðu, avdúkaði Herluf Matras, elsti núlivandi sonur Jóhannes á Heygnum navnið á sambýlinum, sum er uppkallað eftir Jóhannes.

Onnur hildu eisini røðu til hesa hátíðarløtuna. Jóannes Dalsgarð, stjóri á Húsalánsgrunninum, Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum og Gerda Arge, vegna áhugabólkin teimum eldru í Norðoyggjum at frama. Hon handaði eisini heiminum eina minnistalvu, sum borgarstjórin tók ímóti, har eitt ørindi stóð á.

Tá sjálv hátíðarløtan var av, fingu fólk ein te ella kaffimunn við pinnamati og smákøkum afturvið, sum Jákup Ziskason hevði staðið fyri. Nógv nýttu høvi til at fara út á altanina at standa, tí tað var sera lýtt í veðrinum og stilt. Eisini bar til at fara niðan um sambýlið at hyggja eftir teimum 24 eldraíbúðunum, sum helst verða lidnar um eina mánaða ella so.

Sambýlið á Heygnum er sera snotuligt, og í dag kunnu tey fyrstu búfólkini av teimum tilsamans 16 flyta inn í teirra nýggja heim, har tey millum annað kunnu njóta tað einastandandi vakra útsýnið yvir alla Klaksvíkina og yvir á Nestindarnar á Kalsoynni. Vakra útsýnið kom rættiliga til sín rætt í góðveðrinum henda dagin.



*Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu her avmyndaður á altanini við Nestindunum í bakgrundini*



*Gerda Arge, forkvinna í áhugabólkinum teimum eldru í Norðoyggjum at frama, handaði eina minnistalvu til heimið, sum Steinbjørn Jacobsen tók í móti*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Andreas 65 og Árni 70 ár

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskifti, vóru tveir av av teimum drúgvu í arbeiðararørsluni tiknir á bóli av stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag

Tað vóru teir báðir, Andreas Djurhuus úr Vági og Árni Mikkelsen úr Vestmanna, sum báðir høvdu føðingardag, nú aðalfundurin var.

Fríggjadagin fylti Andreas Djurhuus, nevndarlimur í Arbeiðsmannafelagnum Framtíðini í Vági 65 ár og sunnudagin fylti Árni Mikkelsen, formaður í arbeiðarafelagnum í Vestmanna, 70 ár.

Teir fingu báðir stór blómutyssi frá IngeborgVinther, formanni í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað er Andreas, sum er á ovaru myndini





## Hildur Patursson 50 ár



Mánadagin 17. mars fylti Hildur Patursson í Havn 50 ár. Hildur er dóttir Morið og Erlend Patursson í Kirkjubø. Hon er útbúgvin barnagarðslærari í Íslandi, og hevur hon starvast sum barnagarðslærari í Íslandi og í Føroyum. Eitt skifti var hon leiðari á einum íslendskum barnagarði. Eisini hevur hon serlæraraútbúgving og hoyri- og talulæraraútbúgving. Hildur var formaður í Føroya Pedagogfelag í nógv ár og sat í Tórshavnar Skúlaráð tvær setur, til skúlaráðini vóru tikin av. Hildur hevur verið virkin í Tjóðveldisflokkinum, og hevur hon sitið á tingi í umleið 2 ár sum varafólk fyri flokkin. Eitt langt áramál hevur hon sitið í aðalstjórn Tjóðveldisfloksins og í nevndini í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, harav nógv ár sum formaður. Hon hevur stóran áhuga í samfelagsviðurskiftum, og hevur serliga gjørt vart við seg í sambandi við javnstøðuspurningar. Hildur er gift við Paula Nielsen, rektara á Føroya Læraraskúla, og eiga tey døturnar Tjóðhild og Bergtóru.

## Navnið á degnum

18. mars. Aleksander, deyður umleið 250. Úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerusalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, varð blóðvitni uttan blóð, sum tikið varð til.



## Tilhaldið í Tórsgøtu 5 ár

Grækarismessudag 12. mars hevði Tilhaldið í Tórsgøtu í Havn 5 ára stovningardag. Nógv fólk vóru møtt hendan dagin til aðalfund, nevndarval og føðingardagshald. Í nevndini eru: Jákup Lindenskov formaður, Hanna Lisberg, Jórun Simonsen, Sonja Danielsen, Ásmund Johannesen, Jústinus Háskor, Katrin Dahl og Eilif Samuelsen. Nývald eru Katrin Dahl og Eilif Samuelsen. Erik Norderø og Solveig Dam bóru seg undan afturvali.

Á myndini sæst leiðarin í Tilhaldinum, Wanja Petersen.